

## Alment útboð

**Samanbygd hús í Hoyvíkshaganum – verkætlan at fullføra**

Tórshavnar kommuna lýsir við hesum part av matr. nr. 135fe, Hoyvík, alment til sølu.

**Um ognina**

Ognin, ið er partur av útstykkingini Hoyvíkshagin Suður, er býtt í 10 lonir, hvør lonin við millum 2 og 6 húsum. Talan er um tilsamans 43/45 samanbygd hús í 4 ymiskum sniðum við tilhoyrandi úthúsi.

Lendisarbeiði og sokklar eru gjørd til øll húsini.

Lendið liggur sambært almennu byggisamtyktini í A3-øki í 3. grundumráði, og sambært kap. 4, § 7, í byggisamtyktini er heildarætlan gjørd fyri byggingina í økinum.

**Søluprísur**

Ognin verður seld undir einum. Søluprísurin er settur til kr. 18.000.000,-.

**Sølutreytir annars**

Tá kommunan miðar móti at útvega borgarunum dygdargóðar bústaðir fyri ein bíligan kostnað, verður ognin seld tí keypara, ið umframt at bjóða ásetta prísin, sí omanfyri, eisini hevur lægsta søluprís at selja víðari.

Projekt er gjørt fyri ein part av byggiætlanini, og keyparin skal lata gera projekt fyri restina av byggiætlanini samsvarandi hesum projektinum.

Keyparin skal binda seg til at selja lidnu húsini víðari til tann prísin, ið tilboðið til kommununa er grundað á.

Byggingin skal byrja innan 1 ár frá tí degi, at sáttmáli er undirskrivaður millum keypara og seljara, og øll bygging skal verða liðug innan 3 ár. Keyparin skal saman við tilboðnum lata kommununi útgreinaða tíðarætlan, har víst verður, nær einstøku húsini ætlandi verða liðug.

Samanbygdu húsini kunnu bara verða seld persónum, ið standa á bíðilista hjá Tórshavnar kommunu.

**Innkomin tilboð**

Tilboð saman við útgreinaðari tíðarætlan skulu sendast kommununi í afturlatnum brævbjálva, merktur »Samanbygd hús í Hoyvíkshaganum Suður«, og verða hesi hildin í trúnaði, til avgerð er tikin í málinum.

Kommunan hevur ikki skyldu at selja ognina, og tí verður gjørt vart við, at kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini ella einki at velja.

**Útboðstilfar og spurningar**

Útboðstilfar, ið nágreiniliga sýnir verkætlanina og krøvini til einstøku húsini, fæst við at venda sær til snarskivuna frá 18. apríl 2006. Fyri tilfarið verður goldið kr. 1.000,-.

Eru spurningar til søluna og projektið, kunnu tilboðsgevarar venda sær til Tórshavnar kommunu ella Arkitektar 99.

**Freist**

Keypstilboð skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 29. mai 2006 kl. 12.00.

**Tórshavnar kommuna**



# Lærarar søkjast

*Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir lærarum at undirvísa á HH og FHS frá 1. august 2006. Talan er bæði um tíðaravmarkað og føst størv. Tímar eru leysir at søkja í lærugreinunum niðanfyri. Tímatølini í klombrum eru vegleiðandi og treytað av myndugleikanna góðkenning av undirvísing-arvirksemi skúlaárið 2006/2007*

## Tímar til møguligt fast starv

Marknaðarførsla C/A (16 t/v), Samfelagslæra C (10 t/v), Sálarfrøði C (8 t/v), Dekoratión (3 t/v); Sølubúskapur B, A (18 t/v); Altjóða búskapur (10 t/v)

## Tímar til tímalærarastarv

Kunningartøkni c (16 t/v); Føroyskt C, A (32 t/v); Miðlakunnleiki C (4 t/v);

## Arbeiðsuppgávur

- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

## Vit vænta, at tú

- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

## Vit kunnu m.a. bjóða

- eitt fakligt mennandi læringsumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

## Setanarkor til fast starv

Fyrstu tvey árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu vera til reiðar at fara undir kravda námsfrøðilga útbúgving skjótast gjørligt. Eisini hava teir skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til.

## Løn

Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

## Umsókn

Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handils-skúla á Kambsdali. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 3. mai 2006. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fhk.fo.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Páll Isholm, deild-arstjóra, á telefon 444900/219930 ella palli@kambsdal.olivant.fo.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Føroya Handilsskúli á Kambsdali | FO-530 Fuglafjørður | Tel. 444900 | Faks 444901
www.fhk.fo | fh@kambsdal.olivant.fo

*Á Føroya Handilsskúla á Kambsdali ganga umleið 240 næmingar. 100 næmingar ganga á FHS, 100 á HH og umleið 40 taka FHS sum fjarlestur. Á skúlanum starvast umleið 30 fólk harav einir 22 lærarar. Skúlin er partur av Føroya Handilsskúla, ið umframt FHS og HH eisini fyriskipar FHS og HH á kvøldskúla og framhaldsútbúgvingar so sum HD og akademimerkonom.*